Kommunulæknin í Vági loystur úr starvi

Meðan eingin lækni er í Suðuroyar sunnaru helvt, mugu fólk venda sær til lækna á Tvøroyri ella til Sjúkrahúsið
Mynd: Edvard Joensen

Trivnaðarmálaráðið hevur fyribils loyst annan kommunulæknan í Vági úr starvi. Læknin skuldi tann 1. oktober taka við kommunulæknastarvi í Klaksvík, men tað er útsett, meðan ymisk viðurskifti við embætisførsluni í Suðuroy verða kannað

HEILSUMÁL
Edvard Joensen

Annar kommunulæknin í Vági er fyribils loystur úr starvi. Embætisførslan hjá læknanum verður kannað, og setan í kommunulæknastarv í Klaksvík er fyribils útsett, meðan viðurskifti læknans verða viðgjørd, sigur aðalstjórin í Trivnaðarmálaráðnum.

Aibritt á Plógv, aðalstjóri í Trivnaðarmálaráðnum, sigur, at grundin til avgerðina hjá ráðnum er tann umrødan, sum týsdagin var í Sosialinum av einum ávísum máli, har kommunulæknin í Vági var uppií.

– Eingin beinleiðis klaga um læknan er komin til Trivnaðarmálaráðið, sigur Aibritt á Plógv. Onkur einstakur persónur hevur ringt til okkara, men vil ikki leggja navn til nakra klagu. Men tá málið varð alment gjøgnum fjølmiðlarnar, varð gjørt av at kanna tað, og læknin varð biðin um at fara heim at hvíla seg, teir dagarnar, hon hevur eftir í starvinum í Suðuroy. Hon skuldi annars tann 1. oktober flyta í kommunulæknastarv í Klaksvík.

Aibritt á Plógv sigur, at Trivnaðarmálaráðið hevur verið í samband við læknan, og avtalað er, at læknin skal møta á fundi í Trivnaðarmálaráðnum komandi mánadag, har tosast skal um viðurskiftini.

Trivnaðarmálaráðið er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknunum og kann eisini loysa teir úr starvi, meðan landslæknin hevur eftirlitsmyndugleikan.

Aibritt á Plógv sigur, at landslæknin eisini kannar hetta málið í løtuni, og vónar hon, at tann kanningin er liðug til mánadagin, so hon eisini kann verða viðgjørd á fundinum millum læknan og Trivnaðarmálaráðið.

Tað er landslæknin, sum gevur »autorisatión«, t.v.s. góðkennir læknan fakliga, og Trivnaðarmálaráðið kann ikki gera annað enn fylgja honum.

Læknin, sum talan er um, er amerikanari og hevur fingið autorisatión fyri halvt ár í senn. Kravt verður millum annað, at fyri at vera lækni í danska kongaríkinum, skal viðkomandi duga danskt.

Aibritt á Plógv sigur, at hon veit ikki, um hesin læknin dugir danskt. Men hon dugir føroyskt.

Í løtuni er støðan í málinum tann, at Suðuroyar sunnaru helvt hevur ongan lækna, tí hin læknin har suðuri er í summarfrí.

Mánadagin skal tann nú fyrrverandi Suðuroyar læknin koma við síni frágreiðing til Trivnaðarmálaráðið, sum so fer at gera av, um norðoyingar fáa ein avloysaralækna afturat frá 1. oktober ella ikki.

S lvt t tun
r l tt h kkum

H vurt t tr v t lyt tun r frm t . . l m ntr. y t lt r, m sk r ur, ussr, l r ll k nsk h l r k ll r t ll r F r yum. t s s tyrst v Smyr l L n. L n ut r n v vuon .

V t h v s rk r. r lk flut n st l, h nt s st num s t l. t s v r ur flutt try st st h tt h lt fr m n tsu- st .

kk r r yo u f lk ru f s t v t r stut n stut lk n rt r n. rs- s n t l n rum tun n futn n .

H vurt f rm t ll r F r yum. r t v lk m n. tr n t l kk r. V t ru stu v n r. h v l n u. h t u ...

Framtaksgrunnurin endavendast á tingi

Tórbjørn Jacobsen hevur sett Bjarna Djurholm 13 spurnar í sambandi við, at landsstýrismaðurin 1. apríl skifti út nevndina í Framtaksgrunninum. Tingmaðurin vil hava greiðu á, um landsstýrismaðurin royna at seta fólk í nevndir, sum gera sum landsstýrismaðurin vil

FRAMTAKSGRUNNURIN
Eirikur Lindenskov

Tann 1. apríl skifti Bjarni Djurholm út nevndina í Framtaksgrunninum. Tórbjørn Jacobsen vil hava at vita, hvussu hetta nevndarval er farið fram, um landsstýrismaðurin hevur fylgt innstillingum og um hann hevur valt fólk í nevndina, sum umsitingin beinleiðis hevur mælt frá at velja

– Tað vakti miklan ans herfyri, tá nevndin í Framtaksgrunninum legði frá sær. Sagt varð beinleðis, at nevndin ella onkur av nevndarlimunum var komin undir politiskt trýst frá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum nú vil hava greiðu á hesum

– Tað hevur verið róð framundir, at nevndin í Framtaksgrunninu, sum sat frammanundan 1. apríl í ár ikki fekst at makka rætt, soleiðis sum landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, vildi tað, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður Tjóðveldisfloksins, sum nú fer at seta Bjarna Djurholm ein skrivligan fyrispurning um nevndarvalið í Framtaksgrunninum.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at tað vakti miklan ans herfyri, tá nevndin í Framtaksgrunninum legði frá sær. Sagt varð beinleðis, at nevndin ella onkur av nevndarlimunum var komin undir politiskt trýst frá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Í viðmerkingum til fyrispurningin sigur tjóðveldistingmaðurin, at fyri fáum árum síðani var tað ein ringur politiskur óvani, at flokkar sum sótu í samgongu, valdu sínar egnu partísoldátar inn í nevndir og ráð, onkuntið upp á hvamsvís, men ofta við eini greiðari flokspolitiskari ætlan.

– Fakligar ella menniskjansligar dygdir høvdu mangan ongan týdning. Bara partapolitiska stemplið avgjørdi, um tú nú einaferð var hin rætti ella ikki, sigur hann.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at hetta lagið tó hevur verið frægari seinnu árini, men at vend nú tykist vera komin í – og sigur hann, at fleiri slík dømi hava verið frammi seinastu tíðina.

– Hetta er ein støða, sum eitt siviliseað nútiðarsamfelag als ikki kann liva við, heldur hann.

– Málið um Framtaksgrunnin er eitt álvarsmál, ikki minst orsakað av, at grunnurin umsitur ein rættiliga stóran part av føroyskari vinnu. M. a. umleið helmingin av flakavinnuni á landi. Og hartil størsta søluapparatið í landinum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann heldur, at serliga í hesum tíðum, tá tosað verður um at einskilja fyritøkurnar hjá grunninum, er tað rættiliga avgerandi, at tey átøk, sum nevndin ger, tæna fólksins áhugamálum sum best.

– Um so er, at nevndarskiftið varð ætlað sum ein roynd at kjálka frá hesum atliti, soleiðis, at seráhugamál í samfelagnum kundu lívgast í staðin, so er av álvara vandi á ferð, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum heldur tað vera av størsta týdningi fyri samfelagið, hugburðin í samfelagnum yvirhøvur, at fólk verða sett í størv og nevndir eftir dugnaskapi og persónligum eginleikum, og at flokspolitisk atlit ikki eru avgerandi fyri, hvør verður valdur, og hvør verður vrakaður.

Tórbjørn Jaocbsen vil hava Bjarna Djurholm at svara hesum 13 spurningum:

1: Eftir hvørjum metingarstøði (kriterium) verða limirnir í Framtaksgrunninum valdir?
2: Er Framtaksgrunnurin suverenur og sjálvstøðugur í sínum avgerðum?
3: Hvør var ítøkiliga orsøkin til, at undanfarna nevnd í Framtaksgrunninum bráddliga legði frá sær?
4: Tað hevur verið alment frammi, at ósemja var millum undanfarnu nevnd í Framtaksgrunninum og Bjarna Djurholm, landsstýrismann. Hvør var tann ítøkiliga orsøkin til hesa ósemju?
5: Landsstýrismaðurin var ónøgdur við leikluturin hjá fyrrverandi nevndarlimunum í Framtaksgrunninum. Hvørji viðurskifti vóru tað, ið landsstýrismaðurin serstakliga hefti seg við?
6: Hvussu nógvir av núverandi nevndarlimunum í Framtaksgrunninum eru valdir eftir tilmæli frá umsitingini í Vinnumálaráðnum?
7: Er tað rætt, sum nú ljóðar frá, at umsitingin hjá landsstýrismanninum beinleiðis frámælti, at onkur av nýggju nevndarlimunum varð valdur?
8: Hvørji mál sambært viðtøkum Framtaksgrunnsins metir landsstýrismaðurin, at nýggja nevndin kann røkka, sum fyrrverandi nevndin, eftir hansara tykki, ikki megnaði at fremja?
9: Skipar nevndin fyri Framtaksgrunnin seg sjálva, ella skal landsstýrismaðurin sambært viðtøkum ella øðrum reglum skjóta upp formannin í nevndini?
10: Hevur landsstýrismaðurin sjálvur skotið upp ella óbeinleiðis róð fram undir, at ávísur persónur skuldi gerast formaður í nevndini, hetta áðrenn nevndin hevði skipað seg?
11: Hevur nevndin rætt til at skipa seg uttan, at allir nevndarlimirnir eru valdir ella hava havt møguleika fyri at luttikið í hesi avgerð?
12: Eigur tað at fáa avleiðingar, um so er, at nevndin hevur skipað seg uttan, at allir nevndarlimirnir eru valdir ella hava havt møguleika fyri at luttikið í hesi avgerð?
13: Kann landsstýrismaðurin, annaðhvørt hann svarar játtandi ella noktandi uppá spurning 12, geva Løgtinginum eina grundgeving fyri síni niðurstøðu?

Nýtt oljufelag við í leiting við markið

OLJULEITING
Jan Müller

Bretska oljufelagið Premieroil hevur keypt seg inn í loyvið 204/16 og 176/20 á bretskum øki, har Amerada Hess, Dong og BG frammanundan eru. Premier Oil hevur keypt millum 16% og 20,8% av partinum hjá British Gas, sum var uppá 40% í hesum loyvum. Talan er m.a. um loyvið, har borað verður í løtuni og sum er at meta sum ein avmarkingarbrunnur fyri oljufundið, ið varð gjørt á landgrunninum í fjør. Á heimasíðuni hjá Premieroil verður vístá, at felagið er hugað fyri at víðka um sítt virksemi í bretskum øki.

Felagið vísir á, at brunnurin, sum í løtuni verður boraður við Amerada Hess sum fyristøðufelag er ein »low risk apprailsal of the potentially significant Marjun-1 discovery«. Víðari stendur, at feleagið hevur optión uppá at taka á seg annað virksemi, sum BG hevur í økinum. Hetta kann tulkast sum at Premier Oil fyrr ella seinni hevur møguleika at keypa seg inn í partin, sum BG hevur í føroyskum øki.

Tað er so eisini eitt sindur av óvissu kring lutin hjá British Gas í tí loyvinum. BG var við í upprunaligu boringini, men tá avgjørt var at bora longur niður enn ætlað frá byrjan, vildi BG ikki vera við. Tað var tá, at Amererada Hess rakti við olju og gass. Síðani hevur ikki verið greitt, um BG fór at keypa seg inn aftur í tann partin av boringini. At BG nú selur út av sínum parti hinumegin markið kann benda á, at felagið er á veg út úr føroyska økinum. Ella at tað vil minka um sín part.

Dong víðkar um leiting í Føroyum

OLJULEITING
Jan Müller

Danska oljufelagið DONG, sum er við í samtakinum »The Faroese Partnership« saman við Amerada Hess, BG og Atlants Kolvetni, víðkar nú um sín lut í føroysku leitingini. Felagið hevur júst gjørt avtalu við Phillips um at keypa tess part uppá 20% í 9 ára loyvinum 006. Hini felógini í hesum loyvi eru Statoil (27,5%), Anadarko (27,5%), Enterprise (Shell hevur yvirtikið), (15.0%) og Veba (Pan Canadian hevur yvirtikið), (10%)

Dong sigur á síni heimasíðu, at orsøkin til, at henda avtala er gjørd við Phillips er tann, at felagið ynskir at økja sítt virksemi á Atlantsmótinum tvs. bæði vestan fyri Hetland og eystan fyri Føroyar. Umframt at vera við aí loyvi 001 á føroyskum øki, har rakt varð við olju í fjør, er Dong eisini við í trimum loyvum á bretskum øki.

Tað vísir seg, at danska oljufelagið er farið at leggja seg eftir at koma uppí oljuleiting og framleiðslu uttan fyri Norðsjógvin. Herfyri keypti felagið upp partar í loyvum á norskum øki og verður hildið fram við hesi strategiini.